navn

Google

# ebook- TÚ?



## FORVITNI

**Eyðkenni:** Hevur nógvar vinir og fær støðugt fleiri. Nýtir fleiri tímar dagliga á Facebook.

**Á Facebook:** Hesa typuna merkir ein ikki so nógv til á Facebook, heldur merkir tú hana, tá tit hittast til føðingardagar, og hon kennir tín mann, børn, verforeldur og arbeiðsfelagar aftur við navni, og tú situr sum kánus - "Hvussu veit hon alt hetta?" - svarið er einfalt - forvitni er inni á tíni Facebook-síðu og hyggur eftir myndum og lesur viðmerkingar. Á hendan hátt veit hendan typan eina rúgvu um teg og tíni.

## ÓMETTANDI

**Eyðkenni:** Hevur yvir 1.500 vinir og finnur dagliga nýggjar vinir. Er við í bólkinum "Øll sum hava undir 500 vinir eru looosers". Hevur oftani starv innan fjølmiðlar ella politik.

**Á Facebook:** Skrivar oftani um sítt starv. Viðmerkingar til tíðindasendingar ella greinir, hon hevur lisið. Fær eina rúgvu av viðmerkingum, eftisum hon oftani er ein persónur, ið hevur vald. Vinirnir hjá hesum persóninum vita ikki rættuliga, hví tey eru Facebook-vinir - tað er bara stuttligt at hava ein "kendan" persón í sínum vinaskara.



## INFORMATIÓNSFRÓÐI

**Eyðkenni:** Hevur oftani arbeiði á skrivstovu ella er arbeiðsleysur. Er rættuliga upptikin av sær sjálvum og eigur eina Iphone, har flestu uppdateringarnar koma frá.

**Á Facebook:** 08:15 Morgunkaffi var gott - 09:30 Næsti koppurin er farin niðurum - 10:50 Nú byrjar man at leingjast til døgverðan ... og soleiðis heldur hendan typan á fram allan dagin. Oftani heilsar henda typan sínum Facebook vinum góðan morgun og góða nátt. Um hann keypur nakað, kemur tað eisini við, og tá tit so hittast úti, er hann kløkkur, um tú ikki hevur fingið við, at hann hevur keypt nýtt sjónvarp.

## HILMAR JAN HEVUR 3.237 VINIR

MIÐLAMAÐURIN OG SKEMTARIN HILMAR JAN HANSEN ER EIN AV TEIMUM, IÐ HEVUR SERA NÓGVAR VINIR Á FACEBOOK. Í LØTUNI ERU TAÐ HEILIR 3.237

### Hvussu ber tað til at tú hevur SO nógvar vinir?

- Veit ikki akkurát, men giti mær bara til, at tað kemst av, at man viðhvørt er frammi í almenna rúminum. Eg kenni verri enn so allar av mínum »vinum« á Facebook, men havi hinvegin ikki hug at siga nei, tá onkur ynskir vinarlag har. Hava fólk hug til at vera mínir vinir á Facebook, so dugi eg generelt ikki at síggja, hví eg skal hava nakað ímóti tí.

### Hvat krevst fyri at blíva tín Facebook-vinur?

- Ikki annað enn tað, at tú ikki ert eitt veruligt reyvarhol – altso heilt inn á botn! Um onkur pedofilur ella okkurt líknandi bað um vinarlag, hevði viðkomandi komið undir ta kategoriina, men tíbetur haldi eg meg ikki kenna fólk av slíkum slagi, so Facebook-gáttin annars er helst rímiliga lág hjá mær...

### Hvat brúkar tú Facebook til?

- Fyrst og fremst sum eitt sosialt netverk, ið eg gjørdist partur av púrasta av tilvild. Tá eg fór á Facebook fyrstu ferð, visti eg einki um tað og hevði ongar ætlanir við tí soleiðis. Men tað hevur verið stuttligt tann vegin at hitt gamlar skúlafelagar, skyldfólk og líknandi, umframt at tað í arbeiðshøpi viðhvørt er lættari at fáa fatur í fólki á Facebook, enn tað er at ringja til teirra ella senda teimum ein teldupost.

### Hvussu oftani er tú inni á Facebook?

- Svingar nokk so nógv, men ikki hvønn dag. Um eg sjálvur havi skrivað okkurt provokerandi í status, fari eg kanska heldur oftari inn at vita, hvørjar reaktiónirnar eru. Men tað kunnu saktans ganga fleiri dagar ímillum, og eg skilji slett ikki tey, ið opinbart búgva og liva inni á Facebook! Eg fyritrekki heilt greitt veruliga lívið, so einki bendir á, at Facebook heldur fer at fylla meira hjá mær í framtíðini.

### Hevur tú nakrantíð sletta nakran Facebook-vin? Hví?

- Ja, tað er ið hvussu er komið fyri eina ferð. Tað var ein, sum var so sera pátreingjandi, at hann bara órógvaði. Eg tími illa at chatta, sum summi opinbart elska at gera, men eg kann alíkavæl chatta onkra hendinga ferð við fólk, eg kenni væl. Men sjálvt tey skulu ikki vera vís í, at eg tími at svara teimum, tí hatta chattið er sum oftast tíðsspilla! Eitt stórt undantak er abbadóttirin, ið eg gleði meg at chatta við hvørja ferð, tí hon – hóast sín unga aldur – dugir so væl at skriva og málbera seg!